

# Greenpeace-fólk upp á boripall hjá Statoil

D

**Jan Müller**

27.05.2014 - 10:42

Oljan.fo

Fólk úr Greenpeace tóku seg í morgun upp á ein boripall hjá Statoil tætt við Bjarnoynna.

Pallurin, sum eitur Transocean Spitsbergen, skal eftir ætlanini fara undir at bora við Bjarnoynna. Fleiri hava mótmælt ætlanini, men í gjárkvøldið fekk Statoil endaligt loyvi at fara undir at bora.

Greenpeace-skipið Esperanza hevur ligið tætt við boripallin og bíðað, og tíðliga í morgun fóru fólk úr átta londum av skipinum og tópku seg upp á pallin.

-Hendan boringin er fullkomiliga ábyrgdarleys. Statoil setir alt náttúruríkidømið á Bjarnoynni í váða fyri at fáa meiri olju, sum hóttir veðurlagið. Tí eru vit komin higar til biðja Statoil steðga hesum, sigur Erland Tellnes, sum er umborð á Esperanza, við norska kringvarpið.

Hjá Statoil siga tey, at tiltakð hjá Greenpeace er ólógligt og ábyrgdarleyst.